Landssjúkrahúsið




# Isolatión á sjúkrahúsinum

**Isolatión á sjúkrahúsinum**
Tú ert í isolatión, tí tú hevur tekin til sjúku, sum kan bera smittu víðari. Endamálið við isolatión og smittufyribyrgjandi tiltøkum er at minka um smittubreiðslu. So skjótt sum vandin fyri smittu er av, skalt tú ikki vera í isolatión longur.

At vera í isolatión merkir, at tú liggur á einastovu við egnum baðirúmi, sum einans tú kanst nýta.

Í samráð við starvsfólkið, verður avgjørt, nær tú aftur kanst fara út av stovuni.

**Smittufyribyrgjandi tiltøk**
Tá starvsfólkið skal hjálpa tær við ymiskum, bera tey svintu, handskar og møguliga munnbind og brillur; hetta fyri, at minka um vandan at bera smittuna víðari.

**Hondreinføri**
Fyri at minka um smittubreiðslu, er tað av stórum týdningi, at tú hevur gott hondreinføri. Røktarfólkið vegleiðir teg í hesum.

**Vitjandi**
Vitjandi skulu seta seg í samband við starvsfólkið áðrenn farið verður inn á stovuna.

Tey skulu helst ikki vitja aðrar sjúklingar sama dag, sum tey vitja sjúkling, ið er í isolatión.

Vitjandi skulu sprittað hendur áðrenn tey koma inn á stovuna og tá ið tey fara.



**Ráð og vitan**

Ert tú í iva ella tørvar tær meir vitan um smittuvandan, set teg so í samband við starvsfólkið á deildini.

Landssjúkrahúsið

Klinisk Stápseind  J. C. Svabosgøta 41-49